## Klinsmann vildi ikki til Chelsea

Fyrr í ár var tað upp á tal, at týski venjarin Jurgen Klinsmann skuldi verða nýggjur venjari í enska felagnum Chelsea. Klinsmann hevur nú sjálvur tosað alment um hetta. Hann vildi tó ikki taka av tilboðnum frá enska felagnum, tí tað hevði havt ov stóra ávirkan á familjuna. - Eg hevði verið noyddur at flyta aftur til Europa, og tað vildi eg ikki bjóða familjuni, sigur Klinsmann, ið er búsitandi í USA.Ístaðin gjørdist tað so Jose Mourinho, sum helt fram sum venjari í felagnum.



## Liverpool við metstórum tilboði

BBC vil verða við, at enska felagið Liverpool er til reiðar við einum metstórum tilboði fyri spanska landsliðsspælaran Fernando Torres, sum spældir fyri Aletico Madrid. Sambært BBC hevur Liverpool gjørt eina avtalu við spanska felagið um at keypa Torres fyri slakar 300 milliónir krónur. Viðhaldsfólk hjá Altetico Madrid hava mótmælt, at felagið ætlar at selja sín liðformann, men Liverpool hava tey góðar vónar um, at Torres fer at spæla har næsta kappingarár.

# Opnahjallur og fýrverkari við Løkin



*Oddaliðini spældu javnt í Runavík, og tað tóktist eftir dystin, sum at bæði liðini kundu liva við úrslitinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

*NSÍ*

*EB/Streymur*

**Intensiteturin var stórur, og mistøkini ógvuslig, tá ið EB/Streymur slapp úr Runavík við einum stigi**

**NSÍ-EB/STREYMUR**

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var støðugt tætt og spennandi, og tá ið fíni dómarin hevði bríksladð fyri síðstu ferð, tóktist tað sum um, at báðir partar kundu liva við 1-1.

Bæði NSÍ og EB/Streymur kundu hyggja aftur á løtur, tá ið teir høvdu fínar møguleikar at avgera, men hvør parturin kendi bara sína vitjunartíð eina ferð.

Einsamalli EB/Streyma álopsspælarin Arnbjørn Hansen legði gestirnar framum, tá ið hann kom ímillum kiksaða afturlegging. Næstan av baklinjuni í høgru høgdi hann bóltin í mótsatta síðunetið, og tað var væl skiljandi, at teir á heimaliðnum sóu sera harmir út.

NSÍ legði bragdliga fyri. Ferð eftir ferð spældu teir seg ígjøgnum í vinstru, og tað stóðust fleiri vandamiklar støður burturúr. Stútari frá annars púra ósjónliga Andersson varð eftir horna bjargaður á strikuni, og fleiri aðrar ferðir leikaði hart á í brotsteiginum. At tryggi miðverjin Egil á Bø og miðvallarin Símun Eliasen tíðliga sóu gult gjørdi tað ikki lættari hjá EB/Streymi.

Eftir leiðslumálið lætnaði tað hjá gestunum, og tað var um reppið, at mest eyðsýndi miðvallarin, Ronnie Samuelsen, økti um leiðsluna. Men stútarin eftir uppspæl í vinstru brast í tvørtræið.

### Vandamiklir deyðbóltar

Ferðin var lægri eftir steðgin, og eksplosiviteturin og hugflogið vóru einki at rópa hurrá fyri. Heimaliðið hevði trupulleikar, tí miðvallararnir fluttu seg ov lítið fyri hvørjum øðrum, og tí fyri álopsspælararnir – burtursæð frá frálíka Hjalgrími Elttør – vóru lítið eyðsýndir.

Útjavnandi málið skoraði Hjalgrím Elttør eftir langt innkast úr høgru frá Einari Hansen. Bólturin endaði í brotsteiginum mitt fyri, og Hjalgrím smekkaði bóltin dygst inn við handara stólpanum.

Eina løtu kendist tað sum um, at NSÍ fór at fáa rættuligt tak á, men tað megnaðu teir kortini ikki.

EB/Streymur var sera vandamikið í deyðbóltsstøðum. Tað var serliga í hesum førunum, at tað sást, hvussu ótryggir heimamenninir vóru undir egnum máli. Símun Eliasen og Hanus Eliasen høvdu risa møguleikar, og tað var væl skiljandi, at teir á heimaliðnum vóru fegnir um, at dómarin peikaði uttanfyri brotsteigarmarkið, tá ið hann metti, at Pól Thorsteinsson hevði skumpað í ryggin á mótstøðumanni.

Frísparkinum kom einki burturúr, og hóast viljin tóktist var stórur, so megnaði hvørki liðið síðstu løtuna at spæla seg til upplagdar møguleikar.

# Eingin John og full Skála úrtøka

*B71*

*Skála*

**Skála fulla úrtøku við ongum venjara, og B71 megnaði onga úrtøku við nýggjum venjara**

**B71-SKÁLA**

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Skála ferðalagið fór seint seinnapartin sunnudagin í góðum hýri um Skopunarfjørð. John Petersen hevði longu frammanundan, at hann gjørdist venjari í barndómsfelagnum, lagt ætlanir um uttanlands frítíð hesa vikuna. Undan fráferðini hevði hann givið boð um konseptið, sum var, at Skála skuldi binda um í verjuni og dúva upp á snarálop.

Á Sandi varð tað sunnudagin boðað frá, at ímyndin av felagnum, Eli Hentze, nú skal hava ábyrgdina av liðnum tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

B71 hevði pláss at spæla á, og heimaliðið legði bragdliga fyri. Sandoyingar høvdu møguleikar at leggja seg á odda, men teir misnýttu. Sum 1. hálvleikur leið fótaði Skála liðið sær, og tá ið teir fóru at hvíla seg, tóktist tað sum um, at tað var gestunum meiri til fyrimunar.

Beinanvegin eftir steðgin syrgdi púra leysi Alexandur Johansen eftir innlegg fyri, at síðsta stóra løtan var eftir treytunum hjá skálamonnum.

### Spældu kontra

Eftir 1-0 málið dúvaði Skála upp aftur meiri upp á trygt verjuspæl, alt meðan teir høvdu vakið eyga fyri møguleikanum at fara í skjótt mótálop.

Sandoyingar vóru noyddir at sleppa eitt sindur í verjupartinum. Fríska lotið gjørdi tað torført at hava tak á samanspælinum, og ov ofta varð loysnin við longum og óneyvum sendingum vald.

Símin Hansen, sum ikki var førur fyri at spæla frá fyrsta bríksli, varð saman við málsókna Jónsvein Thomsen, sum loysti venjaran av, settur á vøllin, men tað spurdist einki burturúr.

Heldur var tað innskiftarin hjá Skála, sum var heppin. Slavisa Kaplanovic, sum Skála formaðurin, Hans Jákup Andreasen, eftir lítlan tíma hevði sett á vøllin fyri Boga Gregersen, staðfesti útisigurin, tá ið hann eftir skjótálop varð púra leysur og setti bóltin framvið Símuni Rógva Hansen.

So bundu skálamenn uppaftur meiri fyri í verjupartinum, og heimamenninir høvdu einki tiltak at seta upp ímóti. Sigurin ber við sær, at Skála aftur setti seg á sætta plássið, sum B71 fyri einari viku síðani tók frá skálamonnum.